# Haldi kjakið, um okkara skúlaskipan, á einum sakligum støði!

FRÍÐÁLVUR JENSEN
fyrrverandi skúlastýrislimur



**- tí hetta er størsta tilfeingið, vit eiga í okkara samfelag, men broytingar eiga at fremjast**

Tá eg sat sum skúlastýrislimur herfyri, kom tað rættiliga dátt við, at skúlin ikki hevði førkað seg stórvegis frá tíðini, tá eg sjálvur gekk har í sekstiog sjeytiárunum.

Eg eri púra samdur við teimum sum siga, at okkara skúli skal tillaga seg teimum krøvum og fyriskipanum, sum samfelagið setur, og tí er sanniliga neyðugt, at tað allatíðina verður hildið lív í kjakinum, so okkara unga ættarlið hevur so góðan førleika sum gjørligt – at fara víðari út í samfelagið við.

### Samskifti og kunning

Tá hugsað verður um broytingingina, frá gomlu fólkaskúlalógini til ta nýggju, so er tað ongin ivi um, at ynski hevur verið, at tað skal verða eitt minni glopp ímillum heim og skúla. Við hesi broyting hevur tað alstóran týdning, at lagt verður upp til, at fáa foreldrini við í tað sum fyriferst á skúlanum, og harvið skulu vera við í arbeiðnum, sum skal fáa skúlan uppá tað støði, nútíðin setur.

### Verður bólkaarbeiði og framløga undirmett?

Eg kann minnast frá míni lestrartíð á Tryggingarháskúlanum í Keypmannahavn, seint í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum, at tað varð ein heilt annar frálæruháttur nýttur, sum eg má siga gav mær nógv størri førleika at arbeiða innan tryggingarøkið, tí ein lærdi ikki bara tað fakliga innan trygging og jura, men ein fekk eisini góðan førleika at arbeiða í bólki, og hetta at duga at leggja fram, sum jú hevur so alstóran týdning í nútíðarsamfelagnum. Tí seti eg mær spurningin: Verður tað gjørt ov lítið at fáa næmingin at arbeiða eftir hesum leisti, og er tað veruliga so, at vit ikki síggja týdningin av, at tað hevur so alstóran týdning – júst hetta, at vit ikki eru einstaklingar bara, men at vit øll saman fáa tað betra úrslitið? Hví seta arbeiðsplássini í lýsingarnar eftir starvsfólki: Góð samstarvsevni? Er tað ikki júst tí, at tað hevur so stóran týdning, at tann einstaki dugir at arbeiða í bólki – ella hví er tað? Tí er tað eg seti mær sjálvum og ikki minst tykkum spurningin: Eiga vit ikki í størri mun at leggja frálæruna soleiðis tilrættis, at næmingurin fær henda førleikan at fara út í samfelagið við – hetta at kunna verða betri til at arbeiða í bólki, og at duga betri at leggja síni sjónarmið fram? Tað hevur alstóran týdning, at vit fáa eitt kjak um hesi viðurskiftini, tí skúlin skal og má leggja seg eftir at liva upp til tey krøv, samfelagið setur.

### Vit eiga ØLL at føla ábyrgd!

Ongin eigur ella skal føla, at hetta evnið ikki hevur nakað við seg at gera. Rætt er tað, at vit hava myndugleika á økinum, sum skal taka røttu avgerðirnar, men vit mugu øll hava eina meining um, hvussu okkara skúli skal síggja út, og hví møguligar broytingar eiga at fremjast.

Eg havi stóra virðing fyri teimum sum vilja leggja rygg til – at leggja tað besta niður í okkara børn, men vit skulu minnast til, at hesi arbeiða eftir tí leisti, sum er lagdur fyri dagin.

Vónandi, kemur gongd á sakligt kjak, og at hetta kennist viðkomandi fyri okkum ØLL!

# Ósakligar atfinningar um tíðindaflutningin eftir flogvanlukkuna

JÓHANN MORTENSEN
Tíðindaleiðari í Útvarpinum



### Aftursvar til Leon Smith

Leon Smith hevur í í Sosialinum og Dimmalætting mikukvøldið eina atfinningarsama grein ímóti føroyskum fjølmiðlum "við Útvarpinum á odda" í samband við flogvanlukkuna í Noregi og tíðindaflutningin eftir hana.

Grundleggjandi atfinningin í greinini er, at fjølmiðlarnir áhaldandi hava spurt um trygdina hjá Atlantic Airways.

Sum fjølmiðil er tað okkara skylda at seta spurningar. Eisini kritiskar spurningar.

Menskyldan um góðan fjølmiðlasið er hildin og neyðug atlit eru tikin. Í hvørjum einasta føri, spurnartekin er sett við trygdina hjá Atlantic Airways, er málið kannað, og umboð fyri flogfelagið hava fingið høvi at svara aftur.

Vit hava ikki "kritikkleyst" endurgivið norskar fjølmiðlar. Í einum føri endurgóvu vit norskan fjølmiðil fyri tíðindi um, at starvsfólk hjá Aker-Kværner settu spurnartekin við trygdina hjá føroyska flogfelagnum. Men í sama innslagið høvdu vit eisini viðmerking frá stjóranum í Atlantic Airways til norsku atfinningarnar.

Í greinini skrivar Leon Smith eisini um viðurskifti, sum ikki passa.

Útvarpið umrøddi ongantíð málið, tá fráfarni flogskiparin, Hans Hansen, skuldi havt flogið eitt flogfar hjá Atlantic Airways við ferðafólki til Føroya.

Harafturat hava vit ongantíð brúkt orðið neyðlending, tá talan var um trygdarlending. Tvørturímóti siga vit longu í fyrsta innslagnum um hendingina, at talan er ikki um eina neyðlending, men um eina trygdarlending. Og dagin eftir seinru trygdarlendingina gera vit harafturat eitt innslag, har júst munurin millum trygdarlending og neyðlending verður greinaður.

Heldur ikki settu vit trygdarlendingina, tá flapsini ikki virkaðu, í samband við vanlukkuna í Stord. Eitt tað fyrsta, vit gjørdu tann morgunin tá vanlukkan hendi, var at kanna, um talan var um sama flogfar, sum stutt frammanundan setti seg av trygdarávum. Tað var ikki sama flogfar og tað staðfestu vit sama fyrrapart kl. 10.00.

Tí er niðurstøðan, at einki páhald hjá Leoni Smith hevur hald í veruleikanum. Mæli honum tí til at brúka sannar grundgevingar, næstu ferð hann finst at øðrum um ein kamb.

Um eftirlit skrivar Leon Smith annars, at "journalistar okkara skulu vera glaðir fyri, at ein altjóða eftirlitsmyndugleiki ikki andar teir í nakkan alla tíðina".

Vit hava ikki nakað altjóða eftirlit, men vit hava tíbetur fingið lóg um fjølmiðlaábyrgd. Eftir henni ber til at kæra til fjølmiðlanevndina um vánaligan fjølmiðlasið. Og tað kann Leon Smith gera, um hann heldur, at vit ikki hava hildið góðan fjølmiðlasið.

# Eyðun Mohr Viderø og móðurmáls-inspiratión 2015

REGIN EIKHÓLM



Í Sosialinum og Dimmalætting 23.10.06. hevur Eyðun Mohr Viderø eina viðmerking til grein hjá mær í Sosialinum 09.10.06. og í Dimmalætting 11.10.06. um móðurmálið.

Tað er altíð hugaligt, tá ið onkur tímir at lesa tað mann skrivar. Eg eri eisini so rørandi samdur við Eyðun, ið bæði er musikari, sangari og kvøðari, at føroyska móðurmálið er yndisligur tónleikur, bæði í talu, skrift, sangi og kvøðing. Tað er tí vert at verja og menna, soleiðis at móðurmálið ikki rennur upp á slokk í nýføroyskum esperanto-líki, fremmandagjørt og uttan móðurmálsligan nærleika.

Hinvegin er tjóðskaparkensla / -stoltleiki íborin øllum menniskjum, og er okkum øllum eitt ómissandi mentalt og nationalromantiskt kjølfesti. Men viðhvørt eru tað nøkur fá sum taka patent upp á hesi hugtøk og gera tey til eitt mál í sær sjálvum. Tað faktuella verður bakatelliserað - viðhvørt enntá beinleiðis falsificerað við villleiðandi dreymamyndum.

Yvirdrivin tjóðskaparkensla / –stoltleiki er ikki til at spæla við, tí í skeivum hondum kann tað fáa fatalar fylgjur. Eitt ikki ókent fyribrigdi í okkara heimliga Europa.

E.S. Peningagrabbi úr danska statskassanum er móðurmálinum óviðkomandi, men heldur eitt Norðuratlants-bólka-paradox. Ynskiligt og kanska meiri relevant hevði verið um Eyðun hevði sagt sína hugsan um føroyska ABC – problematikkin ella um støðuna hjá millumtjóða orðum í føroyska málinum!

# Yvirlýsing frá Kvinnufelagasamskipan Føroya

Vit vilja hava, at Føroyar skulu vera eitt samfelag fyri øll - har ongi verða háðað, spottað ella forfylgd - men har øll kunnu kenna seg trygg og vard móti ágangi.

Kvinnufelagasamskipan Føroya heitir tí á øll tingfólk um at atkvøða fyri ríkislógartilmæli um at broyta revsilógina soleiðis, at háðan, happing og forfylging av fólki vegna kynsligan samleika verður revsað í Føroyum.

Vit heita tí á tingfólk um at atkvøða fyri, at§ 266b.: Den, der offentligt eller med forsæt til udbredelse i en videre kreds fremsætter udtalelse eller anden meddelelse, ved hvilken en gruppe af personer trues, forhånes eller nedværdiges på grund af sin race, hudfarve, nationale eller etniske oprindelse, tro eller seksuelle orientering straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år. verður galdandi í Føroyum.

Kvinnufelagasamskipan Føroya

**Kongshavnar Kvinnufelag**
**Tofta Kvinnufelag**
**Kvinnufelagið í Havn**
**Skála Kvinufelag**

Sambandsflokkurin:

# Eiga at staðfesta Kyoto-avtaluna




*- Einki er at ivast í, at tað hevur alstóran týdning fyri okkara samfelag, at boðskapurin um at vit taka Kyotoavtaluna í álvara, verður sendur umheiminum, sigur Sambandsflokkurin*

*savnsmynd*

**Føroyskir myndugleikar eiga at taka undir við, at Føroyar gerast partur av Kyotoavtaluni, sigur Sambandsflokkurin í tíðindaskrivi:**

Sambandsflokkurin mælir til, at Føroyar gerast partur av Kyoto-avtaluni um at minka útlátið av vakstrarhúsgassum. Tað er tíverri ein sannroynd, at føroyingar á umhvørvisøkinum hava sera vánalig hagtøl at vísa á, og at vit teljast millum tey lond í heiminum, sum útleiða mest av koldioxidi í mun til fólkatalið. Hetta er sera álvarsamt.

Ein orsøk til hesa støðu er, at vit eru ein fiskivinnutjóð, og harvið noyðast at brúka nógva olju, fyri at fáa fatur á okkara náttúruríkidømi. Hetta hevur eisini verið brúkt sum ein undanførsla fyri ikki at taka undir við Kyotoavtaluni. Men samstundis eru tað júst lond sum Føroyar, við tøttum tilknýti til náttúruna, ið hava størsta tørvin á, at náttúran verður óspilt.

Einki er at ivast í, at tað hevur alstóran týdning fyri okkara samfelag, at boðskapurin um at vit taka Kyoto-avtaluna í álvara, verður sendur umheiminum.

Kyoto-avtalan hevur sum mál at virka ímóti teirri heimsumfevnandi upphitingini, og málið er at minka útlátið av vakstrarhúsgassum við 5,2 prosentum samanborið við støðið í 1990 innan tíðarskeiðið 2008 – 2012.